

gjørd kend ígjøgnum myndina, byltingin gav myndatøku eina søguliga dimensión, ið lá væl hægri enn tað virðið, ið myndin hevði havt í vanligum tíðindaflutningi. Fotografering í Kuba gjørdist ongantíð aftur hin sama. Her byrjaði ein nýggj tíð í eini nýggjari listagrein í Kuba. Onkrar av myndunum hjá Korda og øðrum fotografum umboða søguligar løtur og gjørdust eitt slag av ímyndum. Hugsa bara um myndina av Fidel, har ið hann stendir uppi á einum heyggi, í olivengrøna herbúnanum, ryggsekkurin og riflan hanga um herðar hansara, hann lítur út í fjarleikan. Tá ið kollveltingin hevði sínar minni góðu løtur, varð hendan myndin nýtt við myndatekstinum “Comandante en Jefe, Ordene”. Hon varð brúkt á gøtuuppsløgum, á húsaveggjum, í bløðum og tíðarritum, og hevði eina merkiliga megi, ið kundi fáa ógvuliga ymiskar sinnisrørslur fram í hyggjaranum, ið onkursvegna kom víðari úr mótstreyminum og dagliga stríðnum, tá ið hann ígjøgnum myndina varð sannførdur um at hann var partur av eini sera søguligari tíð.

Eitt dømi um eina serstaka mynd hjá Korda, er hon av traðarmanninum, sum klívur upp í ein lyktapela, einaferð tá ið ein av hesum stórfundunum eru á Plaza de la Revolución. Hetta ger hann líka lættliga, sum at klúgva upp í eitt pálmatræ. Traðarmaðurin á tindinum gjørdist eisini ein ímynd. Ímyndin av avtøku av allari tíð. Hann er tað farna, tað verðandi og tað komandi. Kringsettur av einum havi av lagsbrøðrum, partar av søguliga glaðustrokinum. Tað gjørdi einki um Korda nevndi myndina “El Quijote de la Farola” ella “Lyktapela Quijote”

Ein annar stórur myndamaður frá hesi serligu tíðini, áðurnevndi Raúl Carrales, segði einaferð uttan brá av stórlæti:

“Søgan um kollveltingina kann verða skrivað av einum ella fyri tann skuld av milliónum av menniskjum, men hon kann ikki lýsast, verður ikki farið aftur til Korda, Corrales og aðrar myndatøkumenn, ið vóru á staðnum við myndatólinum, tá ið hetta alt hendi í veruleikanum.”

Tá ið Korda varð spurdur um hann hevði ein varhuga av, at myndirnar av Fidel, Camilo Cienfuegos o.ø. skuldu gerast besta og gitnasta lýsingin av hendingunum, tá ið tær veruliga hendu, svaraði hann vinarliga, at tað hevði hann ongantíð hugsa um, hesin møguleikin var als ikki komin honum til hugs.

“Kanst tú siga tað sama um hina serliga gitnu myndina av Che Guevara, sum varð tikin hin 5. mars 1960, samstundis sum líkini vórðu jarðað av teimum, sum doyðu av vanlukkuni, tá ið damparin La Coubra varð sprongdur í luftina á vánni í Havanna?” “Heldur ikki” svaraði hann. “Eg tók ikki so nógvar myndir av Che. Hesa tók eg í hvussu er og kallaði hana “Guerrillero Heroico”, men eg spurdi hann ongantíð um loyvi til at kalla hana soleiðis. Eg var staddur einar 8 ella 10 metrar frá røðarapallinum, harið Fidel greiddi frá smálutunum um spreingingina umborð í damparanum. Eg hevði eina semi-telefoto-linsu í myndatólinum. Knappliga varnaðist eg, at Che kemur fram ímóti rimaverkinum á røðarapallinum. Jean Paul Sartre og Simone de Beauvoir vóru har, og tú var eisini har, Sarusky, sum tíðindamaður. Eg minnist tað væl. Og myndirnar eru jú eisini til enn.”

Fram til hesa løtuna var Che staddur aftanvert hinar oddamenninnar, og Korda hevði ikki sæð hann haðani hann stóð. Myndamaðurin varnaðist hann beinanvegin tá ið hann kom fram fyri at hyggja at mannaflóðini, sum fylti hina 23´ gøtuna í Havanna. Hann tók tvær myndir. Fekk ikki fleiri, tí Che slapp sær burtur aftur við tað sama. Hann mundi ikki standa við rimaverkið í meiri enn ein hálvan minutt, og hetta var júst nógmikið til, at taka hesar báðar myndirnar. Tá ið filmurin varð framkallaður hetta kvøldið, helt hann sjálvur, at myndin av Che var serliga góð. Hann fór til blaðstjórnina á Revolución við jarðarferðarmyndunum, men teir prentaðu bara myndirnar av Fidel tá ið hann røddi og eina mynd av Sartre og Simone de Beauvoir, har var eingin mynd av Che.

Tað løgna við hesi myndini, ið uttan iva er heimsins kendasta, farin út í allar krókar heimsins, í endaleysum endurtøkum, er, at eingin legði nakað í hana tá ið hon varð tikin. Sjey ár seinri, táið hetjudeyðin í Bolivia gjørdi Che til eitt politiskt halgimenni, fekk myndin eina aðra dimensión, ein nýggjan mystikk, gjørdist halgimynd, fyri summi ein trúðarímynd og eitt kultokjekt hjá dyrkarum í mest óhugsandi pørtum av heiminum. Hendan myndin av kollveltingarmanninum er serliga hugtakandi, tí hann útstrálar ein strangleika, ein nærum pastoralan kvalitet.

Hendan kulsliga, gráa morgunin í Havanna hevði Che hálað snarlásið heilt upp undir hálsin á sínum svarta og olivengrøna jakka, og sum vanligt var hann í kendu alpuhúgvuni við gyltu stjørnini, sum Celia Sánchez gav honum, tá ið kollveltingarhirðin stríddist upp í Sierra Maestra fjøllunum. Eitt tekin um, at hann var ein av kommandantunum. Av oddamonnunum. Aftur til myndina. Tað tykist sum hann er beiskur í huga, fyltur av vreiði. Kanska hugsaði hann um sabotørarnar ella kanska um líkini, ið lógu har framman fyri honum, avleiðingin av hevndaratsøknini. Hesin samanhangurin og samband hansara við deyðan reflekterar aftur í tí spenta og djúpa í eygnabrái hansara, sterka høvuðburinum. Upprunin til myndina var ein tragedia, men hon fór hóast tað um allan heimin, í einum endaleysum tali, sum ímyndin av einum nútíðar halgimenni, eini mýtu, sum eini inkarnatión av rebellinum, ið eisini gjørdist partur av eini tragediu. Síni egnu.

Haydée Santamaria var ein av kollveltingarhetjunum í Kuba. Korda gav henni einaferð eitt tvítak av hesi kendu myndini. Ein vælkendur italskur útgevari, Giangiacomo Fetrinelli, vitjaði atelierið hjá Korda í 1967, tá var Che framvegis á lívi, og bardist við guerilla´ini í boliviansku frumskóginum. Fetrinelli handaði Korda ein lepa harið Haydée hevði skrivað soleiðis: “Hesin italski vinurin leitar eftir eini mynd av Che, ið honum dámar. Vís honum tínar.”

Korda hevði ikki fyri neyðini at vísa honum myndina, tí hon hekk har í atelierinum. Hann varnaðist hana sjálvur og dámdi hana alt fyri eitt og bað um tvey tvítøk. Hann fór framvið aftur dagin eftir og fekk myndirnar, spurdur hvussu mikið hann skuldi hava afturfyri tær, svaraði Korda, at hetta var ein gáva. Fetrinelli fór aftur til Italia og goymdi myndina burtur. Tveir ella tríggjar mánaðir seinri var Che skotin og deyður og um somu tíð prentaði italiumaðurin plakatina (1 X 0,7 metur), og soleiðis gjørdist myndin heimsgitin, kanska tann mest selda í heiminum nakrantíð. Bara teir fyrstu seks mánaðirnar seldi hann eina millión eintøk av hesi myndini, ið framvegis gongur sum heitt breyð ímillum nútíðarungdómar.

Korda var eitt slag av hovfotografi hjá Fidel Castro fram til 1968. Ljósmyndagerðin var nærum avløgd og Granma var komin ístaðin fyri Revolución og Hoy. Granma brúkti ikki myndir á sama hátt sum hini bæði bløðini gjørdu í byrjanini. Tíðirnar broyttust og eisini mátin sum tíðindamenninir taklaðu hetta ymiska uppá, kanska var hetta ein lættari máti. Har var kanska ikki eitt so ásýniligt mál longur, men sjálvandi var málið har allíkavæl.

Men hóast hetta, so var Korda framvegis sannførdur um, at myndatøka kundi ríka sál hansara og sinnisrørslur, á hesi blágrønu oyggj, Kuba. Hann fór nú undir at taka myndir upp undir sjóvarmálanum. Hetta var dagdvøljan fram um aðrar, hann hevði myndatólini og soleiðis mundu mong vikuskifti fara á havleiðunum kring hesa kendu oyggj. Hann var tilelvaður at fremja ella kanska at skapa eitt undirvatnsmyndastýrið til vísindaligar rannsóknir á vísindaliga háskúlanum, og hetta fekk hann eisini frá hondini. Hann virkaði við hesum í 12 ár og í áttatiárunum, trúgvur sum altíð, ímóti sær sjálvum, vendi hann aftur til mótan og mótamodellini.

Tað verður torført at finna meiri margbroyttan og serligan myndamann, í allari myndatøkusøguni, enn Alberto Korda. Síggja vit burtur frá tí, at hann er skaparin av teimum kendastu myndunum, til allar tíðir, í einum landi ella kanska í øllum londum, so loyvdi hann sær eisini tann framíhjárætt, at gerast meistarin í glógvandi og tølandi mótaheiminum harið guðdómligu modellirnar umgirdu hann. Kanska er okkurt samanfall. Tá ið hann avmyndaði søguligar løtur og menn skapti hann kanska søguna í farnu øld, sum varð somikið meiri ókyrr enn so mangar aðrar, á sín egna hátt. Hann helt fram við at vera meistarin í litspælinum, tøgnini, sakloysinum, hugnaliga heiminum undir sjóvarmálanum og hann kom aftur í hæddina í sínum brennandi og professionella lívi, fullur av treystleika og vísdómi, tá ið hann vendi aftur, ímillum gomul minnir og nýtt ágrýtni, til ótamda láturin og eleganta blíðskapin hjá mótafrillunum í Havanna.

Alberto Diaz Gutiérrez, alias Korda, andaðist í París í 2001. Legendan ið skapti eina aðra legendu hevði róð sín seinasta róður. Hvørgin teirra fer nakrantíð í gloymskunnar hav. Tað tryggjaðu teir sær við at fylgja huga sínum og hjarta.

Jaime Sarusky er høvundur og tíðindamaður. Hann varð føddur í Havanna í 1931. Hann hevur givið tvær skaldsøgur út: “La búsqueda” (1961) og “Rebelión en la octava casa” (1967). Partar av bestu greinum hansara er útgivnar undir heitinum: “El tiempo de los desconocidos” (1977) og “El unicornio y otras invenciones” (1996). Í eini aðrari av bókum hansara, “Los fantásmas de Omaja” (1966), er savnaðir rannsóknir hansara av minnilutum í Kuba. Hesir eru m.a. norður-amerikanarar, sviar, japanarar, fólk av indiska subkontinentinum og meksikanarar av Yucatan hálvoynni. Sarusky hevur hildið eina røð av fyrilestrum á lærdum háskúlum og mentastovnum í m.a. Stockhólmi, Gøteborg, Keypmannahavn, San Francisco, Gijón, Candás, Toronto og aðrastaðir við.